## DAGSINS MEINING

# Í dymbildagaviku

Vit eru miðskeiðis í dymbildagavikuni, og páskirnar standa fyri durum. Vikan hevur higartil verið eyðkend av ógvusligum hendingum úti í heimi. Í Palestina, Irak, Pakistan og Afghanistan heldur yvirgangurin fram, og nógv fólk eru deyð av bumbum, sum yvirgangsmenn hava fjalt í mannamúgvum, moskum og á torgum. Tað tykist sum gongur aftur um brekkur við friði, sátt og semju víða hvar, og stórveldið USA, sum hevur átikið sær leiklutin sum heimsins politistur, er um at missa tamarhaldið á støðuni.

Iran er um at gerast kjarnorkuveldi. Forsetin boðaði í gjár frá, at Iran nú var komin upp í hópin av kjarnorkuveldum, men lítið bendir tó á, at landið hevur kjarnorkuvápn. Hinvegin hevur Iran nú tøknina, og hetta ger í sjálvum sær, at USA og Ísrael meta landið sum eina enn størri hóttan móti friðinum. Henda støða kann so aftur elva til eitt sokallað fyribyrgjandi álop frá USA ella meira sannlíkt frá Ísrael, á kjarorkuútbúnaðin hjá Iran. Verður hesin útbúnaður bumbaður fer hetta at elva til uppaftur hægri oljuprisir og ein enn meira ótryggan heim. Iran nýtir stór orð og hóttir vesturheimin, men tað ræður um at skyna á hvat, ið er tómur retorikkur og hvat, ið er verulig hóttan. Eitt er vist, og tað er, at eitt hernaðarligt álop á Iran her og nú fer at økja spenningin millum muslimska heimin og vesturheimin enn meira.

Eisini í Latínamerika prutlar undir lokinum. Í Venezuela og í Peru koma sera sterkar antiamerikanskar kenslur nú fyri dagin. Forsetin í Venezula nýtir sera hørð orð um USA og er í ferð við at tjóðnýta – nationalisera, útlendsku oljufyritøkurnar. Í Peru lovar tann maður, ið eftir øllum at døma verður forseti um tvær vikur, at tjóðnýta allar útlendskar fyritøkur og at reka amerikanar á dyr. Í báðum londum er røringur komin í veldugar fólksligar kreftir og kann henda støða enda við, at USA fer at leggja seg út í demokratisku tilgongdina har. Hetta er hent fyrr og kann sostatt henda aftur. Báðir partar nýta ógvusligan málburð og skal ein fara eftir hesum málburði er fjúsið stutt, og nógv bendir á, at USA so ella so fer at leggja seg út í innlendismál í Peru so væl sum í Venezuela. Bæði lond hava mikið oljuríkidømi, so her eins og í Miðeystri er tað svarta gullið, sum er avgerandi fyri amerikanskan uttanríkispolitikk. Dymbildagavikan verður eisini nevnd stilla vikan, eitt heiti, ið minnir á frið og umhugsan. Tað skuldi so verið, nú farið verður inn í størstu hátíðina hjá kristna heiminum. Hóast heimurin er ófriðarligur og órógvaður av yvirgangi vóna vit, at fólk geva sær stundir at hugsa um páskaboðskapin og at nýta friðin her heima saman við familju og vinum. Vit ynska øllum lesarum og viðskiftafólki eina góðar páskir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vitnaði undir ábyrgd

**BERGUR WARDUM**



Í sambandi við, at Jógvan Páll Lassen advokatur hevur fingið Dan Klein blaðstjóra á Oyggjatíðindum dømdan at mortifisera úttalilsi hjá undir ritaða Bergi Wardum, skal verða gjørt vart við, at undirritaði hevur tikið vitnis ábyrgd av sínum úttalilsum og heldur fast við tey.

Við at hýsa úttalilsum hjá undirritaða, og við tað at fyrningarfreistin einans er hálvt ár, skal fyrningarfreistin fráfallast í nevndu málum.

Heitt verður á Jógvan Páll Lassen advokat og Joen H. Andreassen, fyrrverandi sorinskriva og løgtingsins umboðsmann, at reinsa seg ella at tvinga Dan Klein blaðstjóra á Oyggjatíðindum at uppfylla nevndu dómar við at stevna undirritaða, ið eigur úttalilsini, og við kravi um mortifikasjón fyri at fáa staðfest, um dómarnir kunnu uppfyllast, ella um rætturin eigur at afturkalla dómarnar.

Tað hevði verið meira virðiligt, um nevndu løgfrøðingar, Jógvan Páll Lassen og Joen H. Andreassen, eins og rætturin vístu virðing fyri § 77 í Grundlógini og § 10 í Mannarættindakonventiónini, ið heimilar tali- og skrivifrælsi undir egnari ábyrgd, og lótu vera við at avrætta bakara fyri smið við dómum, ið einans kunnu uppfatast, við at okkurt skuldi verjast, ið ikki toldi dagsins ljós, ið er tað sama sum Berufsverboten!

# Eitt lítið vet um skynsama orku og Eiðisvatn

**HANUS VANG**



Vatnorka kann fremjast skilagott við lítlari umhvørvisávirkan. Hon kann eisini í ólukkumát gerast minni skilagott. Dømi um tað seinna er útbyggingin við Eiðisvatn. Framhaldandi verður drivið á eftir sama leisti, og ikki verður helmað í fyrrenn vestara síða av Skálafjørðinum eisini er turrløgd og vatnið ført norður til Eiðis við 100 metra hæddarmissi á vegnum.

Men vatnið eigur sjálvandi at renna út á Breiðásandi sum tað altíð hevur gjørt.

SEV, landsmyndugleikin, Yvirfriðingarnevndin og allar kommunur í landinum hava til fánýtis roynt at uppheva tyngdarlógina á Eiði, tí nærum dupult so nógv orka kundi fingist burtur úr Norðureysturoy, og samstundis havt Eiðisvatn nærum órørt, og árinið á eitt nú Funningsfjørð minkað munandi.

Av tí at SEV avskrivar - eisini vatnorku – yvir einans 6 ár, so kann tíðin nú vera komin til at venda aftur til at byggja út í hæddini og reetablera Eiðisvatn. Verandi útbygging kann síðani gerast ein reservi til at nýta um øll globala orkuveitingin dettur niðurfyri einaferð.

Aðra útbygging í vatnorku eigur SEV ikki at sleppa at gera fyrr enn fortíðar syndir eru sónaðar á Eiði.

**Vindur vatn og vetni**

At nýta olju til 95 % av orkuveitingini er sera ótrygt í framtíðini.

Ikki er hugaligt at trúgva keðiligum prognosum, men í hesum føri er avgjørt skilabest at saðla um so langt fíggjarvánirnar loyva okkum.

Ein háttur kann vera at útbyggja vindorku, sum umvegis vetni kann brúkast í motorverkunum.

Heldur ikki mugu vit gloyma alla rørsluorkuna í sjóvarfallinum. Vit noyðast at vera við nú nógvar verðinskonsernir kappast um at sleppa at gera fullskala royndir í smáum samfeløgum.

Eisini kann SEV selja ódýrari streym til hitapumpur, ið kunnu margfalda kwh kanska 4 ferðir.

Og so er tað at læra fólk at spara. Har er nógv at heinta. Eisini at hava bíligari streym um náttina.

Ein leið til betri SEV-rakstur kann vera at velja Stýrið og Umboðsráð beinleiðis av brúkarunum, soleiðis at vit fara frá hasum demokratinum eftir kubanskari fyrimynd.

Á eløkinum er nóg mikið at tríva í hjá hugaðum fólki.

Tí eiga vit sum skjótast at privatisera elveitingarøkið, men menna og viðlíkahalda undirstøðukervið - eins og landsvegir.

Heitt verður á SEV um alment at gera viðmerkingar á elveitingamótinum.

Eitt nú við at svara hesum fáu reglum.

Eg havi fyri rættiliga nógvum árum síðani skrivað vinaliga til SEV um at sleppa at knýta vindmylnu inn á netið. Men – enn er onki svar komið. Tað kann ikki vera rætt og fólkaræðisligt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.